2 Grind og grindadráp

- Sig tína hugsan um tann týdning, grindadráp hevur.
- Hví er støðan broytt soleiðis, at mangir føroyingar nú eru ímóti grindadrápi?

Grind og grindadráp

Í øldir hava føroyingar dripið grind, og grindadráp og tvøst og spik eru enn sjónligir tættir í okkara mentan og samleika. Í hesum teksti (skráskrift), sum er væl eldri enn hundrað ár, sæst, hvussu stóran týdning grind hevði fyri fólkið, og hvussu tey gleddust, tá ið grindir komu.

Søkkladnir eru teir, gripsborð[1] á bátunum; tveir menn sita og oysa, drabb[2] er við landið av gulinum.[3] "Tólv skinn til bátin, seks til okkara, sum fáa hálvar partar, og alt veit væl við" - hetta eru tey fyrstu tíðindi, sum verður spurt eftir og straks við gleði svarað uppá. So verður skipað upp úr bátinum og ofta eftir lítlari hvíld farið avstað aftur eftir øðrum farmi, tá ið grindin er stór.

Nú er øll grindin førd heim í bygdina, og nú skal býtast sundur ímillum húsini eftir fólkatalinum, av tí at 25 fólk eru roknað til ein bát í grind; ein bygd, sum hevur 200 fólk, tekur soleiðis til átta bátar. Tó er ikki býtt javnt til øll: tveir heimapartar ganga á ein manspart, sum teir eiga,ið hava ført grindina so langan veg og havt so nógv púl[4] av henni. Hvørt mansbarn í bygdini, frá tí gomlu konuni, sum einki er ment at gera longur, og til barnið, sum liggur í vøgguni, hvør fær sín part. - Er tað tá undarligt, at gleði er á øllum, tá ið verður rópað: "Grindaboð!"

Tekstur: *Brot úr Grindaboð*, V.U. Hammershaimb

Nú á døgum tykist tað, sum at alt fleiri føroyingar einki leggja í, um grindir koma ella ikki. Í eini spurnarkanning, sum gjørd varð seint á heysti í 2007, søgdu mong fólk seg vera ímóti grindadrápi. Helvtin av teimum sekstan til átjan ára gomlu, ið vórðu spurd, vóru ímóti, at føroyingar drepa grind.

Orðafrágreiðing: Gripsborð:[1] báturin er so laðin, at leggur tú hondina flata á stokkin, røkka fingrarnir í sjógv, *Drabb*: [2] óslættur sjógvur, *gul*: [3] frískt lot, *púl*: [4] stríð.

Tikið myndina hevur Kjartan Mads

Tikið myndina hevur John Berg

Tikið myndina hevur John Be

3 Ættleiðing

Les tekstin

- Sig millum annað við støði í tekstinum tína hugsan um ættleiðing.

Brot úr bókini: **Hvítar blómur í Gulu ánni**, Carolin Philipps:

Higartil hevði hon ofta verið illa við, tí hon kendist so væl aftur av útsjónd sínari. Hon hevði heldur viljað verið ljóshærd ella havt brúnt hár, eins og tey flestu. Einaferð hevði hon litað sær hárið ljóst, men tað var eitt stórt mistak. Hevði henni sjálvari dámað tað, so hevði hon nokk ikki lagt so nógv í, at floksfelagarnir argaðu hana. Men hon helt tað vera ræðuliga ljótt, sum at vera stappað í skeiva húð.

Við hús setti hon uppá, at tey skuldu keypa ein rískókara, og hon tók foreldrini á bóli við heimagjørdum várrullum.

Foreldur hennara, ið vanliga altíð stuðlaðu henni, høvdu nú blandaðar kenslur av hennara "asiatisku fasu", sum pápi hennara kallaði tað. Serliga tá ið Lea byrjaði at granska eitt sindur í síni egnu fortíð.

"Eg vil vita, hvaðan eg eri. Er einki, sum kann geva eina ábending um, hvar foreldur míni hava búð? Hvørjari bygd tey vóru úr? Ella búðu tey í Peking, líka til tey doyðu? Hvussu ber tað til, at bæði eru deyð samstundis? Tað mugu vera mostrar og mammubeiggjar til enn. Í Kina liva fólk í stórum familjum. Christin Chung sigur, at hon skilur ikki, hví eg varð koyrd á eitt heim fyri foreldraleys. Pápi hennara heldur, at tað er heilt óvanligt. Í Kina eru næstan ongi heim fyri foreldraleys, tí familjan tekur tað foreldraleysa barnið til sín."

Men foreldrini svaraðu ikki spurningum hennara. Hetta var eisini óvanligt. Fyrr svaraðu tey henni altíð. Tað vóru ikki øll svar, ið Lea var eins nøgd við, men at tey als ikki svaraðu henni, tað kendi hon ikki frá fyrr. Til nú. Vistu tey einki, ella vildu tey einki siga?



Mynd: av heimasíðu Bókadeild Føroya Lærarafelags

4 Heimsins brennideplar

Les tekstin.

- Sig tína hugsan um hetta, at vera hjástaddur í heimsins brennideplum.

Tann 16. oktober, dagin eftir 22 ára føðingardag sín, fór Ólavur Mørkøre av Eiði av landinum. Við navnaspjaldrinum "Eide" á bringuni, ílatin flekkutan kamuflasjubúna í oyðimarkarlitunum, varð kósin sett móti brennideplinum Afghanistan.
Ólavur Mørkøre er partur av danska Gardehus-herliðnum, ið er heimahoyrandi í Slagelse, og sum herfyri varð sent til Afghanistan at tryggja og stuðla uppbygnaðin av Upper Gereshk Valley økinum í tí sera ófriðarliga Helmand-landslutinum. Økið var til í september stýrt av Taliban, tá altjóða herliðið tók ræðið á økinum.

Eftir á Eiði sita foreldur Ólavs, Katrin og Jógvan Mørkøre. Brádliga eru tey tíðindini, sum føroyingar annars vanliga geva sær lítið far um, ein álvarsligur partur av lívi teirra.
- Hatta við at fara inn í herin er nakað, ið Ólavur sjálvur hevur funnið uppá, ger Jógvan Mørkøre greitt beinanvegin og letur ongan iva vera um, at hann er alt annað enn fegin um avgerðina.
- Satt at siga, so undraði tað okkum stórliga, at hann tók hesa avgerð. Ólavur hevur altíð verið ein friðarligur drongur, ið ongantíð hevði skotið við einari byrsu, áðrenn hann fór í herin. Men hann hevði hug at royna okkurt øðrvísi, og tað bleiv so at melda seg inn í herin, og tað verða vit sum foreldur noydd at góðtaka. Hann er myndigur, og hann hevur valt tað sjálvur.

- Ólavur sigur ikki so nógv, men vit vóru øll fullvæl greið yvir, at tað ikki var til stuttleikar, at hann, 22 ára gamal maður, varð noyddur at undirskriva sítt egna testamenti, áðrenn hann skuldi avstað. Tá er ikki so nógv eftir at siga.

Tekstur: Úr Dimmalætting 18. desember 2007

Móðir Teresa, Pol Foto

Læknar uttan landamørk, Pol Foto

Læknar uttan landamørk, Pol Foto

Læknar uttan landamørk, Pol Foto



Hermenn í Irak, Pol Foto

Eftir flóðaldu, Reyði Krossur, Pol Foto

5 Einhvør gáva er ein nýggj byrjan

- Skriva um evnið

Einhvør gáva er ein nýggj byrjan

3

Málningur S.J. Mikines

- Greina málningin. Greið t.d. frá innihaldi, bygging, litum, rørslu, huglagi og kenslum
- Hvat heldur tú um myndina, og hvat sigur hon tær?

S. J. Mikines